# ítróttur

Nr. 181 • hósdagur • 25. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# FM-Sprinttriathlon 2003

**Føroya Triathlon Felag skipaði sunnudagin 21. sept kl. 13.00 fyri FM í sprint triathlon, sum eisini var næstseinasta kappingin hjá felagnum**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*

Kappingin var í Havn, og kappast var soleiðis, at svomnir vórðu 750 metrar. 20 km skuldu súkklast, og at enda skuldu 5 km rennast.

Fyrst var svomið í Svimjihøllini í Gundadali.

Liðugur at svimja, rann íðkarin út á súkkluna, og var súkklað frá Svimjihøllini til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C. Effersøesgøta/Norðari Ringvegur 3 ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins.

Her var skift til renning, og runnið frá Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til høgru eftir Skraddaragøtu, inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins.

Runnið var 6 ferðir runt.

Nógvur vindur var, og tí vóru tað bara 4 mans ið hættaðu sær undir kappingina.

## Vann við súkkluni

Svimjingini var tað Eli sum kom best frá, men honum á baki var Gunnar. Men meðan hesir báðir stríddust við at lata seg í súkkluklæðini fór Evald framvið og fór fyrstur út á súkkluteinin. Men stokkut var gleðin, tí fyrst kom Gunnar sum ein tornado framum, og stutt aftaná eisini Eli. Hesir báðið hildu støðuna líka á mál, hóást Gunnar alla tíðina økti um munin. Eli svam og skifti skjótast, men Gunnar hevði munin í súkklingini og renningini.

Kári, sum var seinastur úr hylinum, tók nakað inn á Evald í súkklingina, men munurin fór ikki rættiliga at minka fyrr enn teir fóru at renna.

Aftur hesaferð, sum so mangan fyrr, komu skiftini Evaldi til góðar. Evald svam og skifti skjótari enn Kári, sum so afturfyri súkklaði og rann væl skjótari, og skal hetta ikki endurtaka seg, so má Kári venja skiftini meira.



*Hjá Kára Simonsen vóru tað serliga skiftini, sum kostaðu tíð*

## Úrslit, sprint triathlon:

| | Svimjing. | Skift 1. | Súkkling. | Skift 2. | Renning. | Samlað tíð |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Gunnar Dahl Olsen | 11:21 | 2:49 | 32:17 | 0:44 | 25:46 | 1:12:57 |
| 2. Eli Christiansen | 11:17 | 2:55 | 36:04 | 0:20 | 26:47 | 1:17:33 |
| 3. Evald Rasmussen | 12:24 | 1:30 | 43:56 | 0:02 | 30:45 | 1:28:17 |
| 4. Kári Simonsen | 14:12 | 2:49 | 43:41 | 0:40 | 28:49 | 1:30:11 |

## Ein kapping eftir

Sunnudagin 5. okt kl 13:00 verúr so seinasta kappingin hjá felagnum í ár, og er tað FM í 1/4 triathlon. Her eru teinarnir 1.500 m svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning.

Fyrst verður svomið 1500 m í Svimjihøllini, síðani súkklað 40 km. eftir Ringvegnum, Hvítanesvegnum og Kaldbaksvegnum til Kaldbaks, Kaldbaksbotn, Kaldbaks, og so aftur til Havnar, til Skógrøkt Landsins, har skift verður til renning.

Runnið verður síðani tvær ferðir eftir vegnum Fram við Strond til Føroya Sparikassa, og aftur til Skógrøkt Landsins, har málið er.

# Jákup var ikki í málinum

**Kenny Arthur var so at siga arbeiðsleysur, men Partick Thistle tapti og er framvegis uttan sigur og er nú niðast**

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*

Tað gongst ikki væl. Hvørki hjá Partick Thistle ella hjá Jákupi Mikkelsen. Eftir at tað ikki hevði eydnast at fingið fult í nakrari av teimum fyrstu fimm royndunum, hevði venjarin hjá Partick Thistle, Gerry Collins, valt at gera onkrar broytingar undan heimadystinum ímóti Dundee United, sum heldur ikki hevði vunnið í fimm teimum fyrstu umførunum.

Ein av broytingunum var, at gamli málverjin, Kenny Arthur, sum var skaddur, tá ið Jákup Mikkelsen varð keyptur til felagið, men sum langt síðani er komin fyri seg, aftur fekk høvi at royna seg. Venjarin hevur seinastu vikurnar sagt, at um Jákup ikki hvørja ferð spælir upp til sítt besta, so fer gamli málverjin at fáa møguleikan. Jákup hevur ikki hildið seg alla tíðina at hava spælt so væl, sum hann eigur at megna, og hóast hann í øllum dystunum hevur havt nógvar góðar bjargingar, so hevur dómurin hjá summum bløðum í Skotlandi verið eirindarleysur yvir útlendska málverjan.

Ímóti Dundee United hevði Partick Thistle serliga í 1. hálvleiki greiða yvirvág, og teir komu til nógvar møguleikar í ikki serliga væl spældari uppgerð. Men Dundee málverjin var stinnur og bjargaði fleiri ferðir heilt væl, og í øðrum støðum vóru heimamenninir ikki nóg avgjørdir og neyvir, tá ið teir royndu seg.

Partick Thistle málverjin var mest sum arbeiðsleysur, Mótstøðumenninir vóru ikki so ofta frammanfyri málinum hjá Kenny Arthur. Teimum eydnaðist kortini at fáa tvey mál, men skotsku miðlarnir geva ikki málverjanum skuldina fyri málini.

Fyrra málið fingu teir, tá ið tað restaðu fimm minuttir av fyrra umfarinum. Eftir horna og stútroynd ímóti málinum var talan um eitt sindur av afturi og fram, áðrenn Charlie Miller smekkaði bóltin í málið.

Í 62. minutti var talan um sama málskjúttan. Eftir uppspæl í høgru og innlegg smekkaði hann til úr tólv metrum, og bólturin sang í netmeskunum uppi í horninum. Partick Thistle hevði roynt at koma afturíaftur, og teir høvdu fleiri góðar støður í sambandi við fríspørk og hornaspørk, men teir megnaðu ikki at gera mál. Tá ið gestirnir høvdu lagt seg framum við tveimum málum, kendist tað sum um, at luftin fór úr heimaliðnum. Partick Thistle er aftast, og teir 4.711 áskoðararnir vóru ikki væl nøgdir. Tað gongur ofta ikki long tíð í útlandinum, áðrenn tað hevur avleiðingar fyri venjaran, um eitt felag ikki vinnur og harvið søkkur ímóti niðurflytingini. Men enn hevur einki verið at hoyrt um, at Gerry Collins fer at fáa sekkin í Partick Thistle.

***Henda greinin varð skrivað til blaðið týsdagin, men orsaka av einum kiksara er hon ikki komin í blaðið fyrrenn nú.***






# Porkeris kvøldskúli

Treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning myndugleikanna, verða hesi skeið í Porkeris kvøldskúla 2003/2004

| Lærugrein: | Tíð: | Lærari: | Telefon: |
|---|---|---|---|
| Hondarbeiði | Tórsdag 19.00 - 22.30 | Sonja Frederiksen | 373 740 |
| Postalínsmáling | Eftir avtalu | Irena Remmer | 373 587 / 373 185 |
| Seyming | Eftir avtalu | Anna A. Poulsen | 373 829 |
| Modellsmíð | Ónsdag 19.00 - 22.30 | Bent Albinus | 374 033 |
| Træsmíð | Tórsdag 19.00 - 22.30 | Mannbjørn Olsen | 373 864 |

Luttøkugjaldið verður goldið fyrsta kvøldið, og tað er 300,- kr. fyri hvørt skeiðið. Luttekur onkur á fleiri skeiðum, verður goldið 150 kr fyri hvørt eftirfylgjandi.

Tilmelding hjá lærarunum sum skjótast.

**Porkeris kvøldskúli**
**Tlf. 373 185**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3654
**Navn:** Sp/f 2S
**Adressa:** Niðaragøta 21,188 Hoyvík.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 18.09.2003
**Viðtøkudato:** 18.09.2003
**Kapitalur:** Kr. 81.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 81.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Regin Jóannes Johannesen, Marknagilsvegur 78, 100 Tórshavn, Bárður Johannesen, Niðaragøta 21, 188 Hoyvík og Erlendur Johannesen, Søre Titlestad 43, N-5243 Fana, Norge.
Stjórn: Regin Jóannes Johannesen, Marknagilsvegur 78, 100 Tórshavn og Bárður Johannesen, Niðaragøta 21, 188 Hoyvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 18.09.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at fáast við virksemi innan ráðgeving, handverk og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 23. september 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3655
**Navn:** P/F 09.09.2003.
**Adressa:** 410 Kollafjørður.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 09.09.2003
**Viðtøkudato:** 09.09.2003
**Kapitalur:** Kr. 800.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 800.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Eivind Sofus Thomsen, 410 Kollafjørður.
**Nevnd:** Terji Thomsen, 460 Norðskála (formaður), Eivind Sofus Thomsen, 410 Kollafjørður og Makonny Dickson, 410 Kollafjørður.
**Stjórn:** Eivind Sofus Thomsen, 410 Kollafjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum ella av allari nevndini í felag.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 09.09.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga, umsita og leiga fastogn, umframt at reka handil, umboðan og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 23. september 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3389, Sp/f Tváttá, 100 Tórshavn

**Viðtøkur broyttar:** 17.09.2003.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 117.000,00 til kr. 374.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 117.000,00 til kurs 300.
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:** Jóannes Martin Hansen, Viðargøta 15, 160 Argir (formaður), Torfinn Johansen Jørindargøta 25, 188 Hoyvík og Ingi Højgaard, Yviri við Strond 106, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av allari nevndini saman.

*Skráseting Føroya tann 23. september 2003*

*Kristin Balle*


**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
AÐALSKRIVSTOVAN

# Teldufrøðingur til Fiskimálaráðið

Í Fiskimálaráðnum verður starvið sum teldufrøðingur hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt. Talan er um eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum uppgávum.

**Arbeiðið fevnir millum annað um**
Design, konfiguratión, uppsetan og ráðgeving í datasamskiftisloysnum hjá Fiskimálaráðnum. Harumframt fevnir arbeiðið um at samskipa eitt felags edvstev fyri Fiskimálaráðið, og at ráðgeva í tvørgangandi málum á Fiskimálaráðnum og til landsstýrismannin.

Tú ert ein strategiskur persónur, ið er vanur at taka avgerðir á hesum støði. Tú kemur at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi, og kemur eisini at hava beinleiðis samskifti við uttanhýsis edv-veitarar.

**Førleikakrøv**
Tú hevur eina viðkomandi útbúgving so sum datalog, datamatikari, DØK, dataverkfrøðingur ella líknandi.

Royndir innan økið, og kunnleiki í design, konfiguratión, uppsetan og ráðgeving í datasamskiftisloysnum er ein fyrimunur. Talan er um eitt tvørfakligt umhvørvi, og tí er tað týdningarmikið, at viðkomandi er fleksibul, tekur initiativ, er samstarvsfúsur og arbeiðir sjálvstøðugt.

**Setanartreytir:**
Løn- og setanarviðurskifti eru sambært avtalu millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmannsskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni Aðalskrivstovan.

Tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til aðalstjóran. Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. oktober 2003 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaráðið, Postsmoga 347, 110 Tórshavn**

Upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálaráðið á tlf. 353030 og tosa við Jørmann Petersen, deildarleiðara.



Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo


